NSÍ-Skála:

# Skálamenn eru sørir móti NSÍ

**Bogi Gregersen verður kanska tøkur, tá ið Skála enn eina ferð skal royna at fáa stig frá NSÍ, um higartil hevur tikið alt, tá ið grannaliðini hava dystast**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Teir á Skála siga, at nú mugu teir eisini syrgja fyri at vinna stig av*

Skála er á heiðursmerkjaplássi, og NSÍ er ikki so langt frá triðja plássinum. Um NSÍ vinnur grannastríðið í Runavík, so flyta teir upp um Skála. Hagtølini siga, at higartil hevur NSÍ vunnið hvørja ferð, tá ið Skála og NSÍ hava spælt. Um tað so hevur verið á Skála ella í Runavík.

- Vit hoyra hatta ofta, og vit ætla ikki longur hava tað sitandi á okkum. Vit halda okkum hava møguleika at fáa stig í Runavík, og tað fara vit at arbeiða hart fyri.

Tað sigur Bogi Gregersen. Álopsspælarin á Skála noyddist at taka seg burturúr, tá ið teir mikukvøldið spældu móti B36. Tá varð roknað við vøddaskaða og steðgi í fleiri vikur. Men nú sigur Bogi, at tað kanska ikki verður neyðug við steðgi:

- Fysioterapeuturin hevur sagt, at talan ikki er um fipurspreinging. Heldur er okkurt forstrekt í lærinum. Eg fái viðgerð hvønn dag, og tað gongdur skjótt rætta vegin. Tað er ikki heilt ósannlíkt, at eg verði førur fyri at spæla mánadagin, sigur Bogi Gregersen.

Bjarni Jørgensen hevur verið burturi frá seinastu ferðirnar, tí hann hevur verið skaddur. Hóskvøldið var hann aftur til venjingar, og hann verður í Skála hópinum mánadagin.

### Positivan trupulleika

Tað kann ganga skjótt hvønn vegin í fótbólti. Bæði so og so. Tá ið NSÍ fór til Klaksvikar, var tað um reppið, at teir fingu mannað lið. Nú eru næstan allir spælararnir tøkir. Tann einasti, sum hevur spælt í landskappingini í ár, og sum ikki er tøkur, er Kári Hansen. Sjúrður Jacobsen hevur leingi verið burturi frá, men hann hevur í vikuni vant við fullari ferð.

- Tað er positivur trupulleiki at vera noyddur at seta spælarar, sum tú veist kunnu standa seg á besta liðnum, á beinkin. Tað kennist væl undir venjing, og tá ið spælarar verða skiftir inn, at teir ovurfegnir vilja vísa, at teir eiga pláss á liðnum, sigur Trygvi Mortensen, venjari hjá NSÍ.

Seinastu tríggjar ferðirnar hevur NSÍ so at siga spælt við sama liðnum. Tað hevur gingið rættuliga væl, so tað er lítið sannlíkt, at talan verður um stórvegis broytingar, tá ið Skála kemur um fjørðin av vitja.

---

TB-GÍ:

# TB bíðar í spenningi

**Í Gøtu vóru fleiri spælarar ivasamir í gjár, men tað varð roknað við og vónað at í hvussu so er Súni Olsen og Popczynski verða førir fyri at spæla**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Í Gøtu er fótbóltslagið einki serligt. Úrtøkan higartil hevur ikki verið góð. Mikukvøldið eydnaðist tað at fáa eitt stig móti NSÍ, men tað var neyðugt. Nú stendur vitjan á Sevmýri fyri framman. Tað hevur gingið illa hjá GÍ at fáa mál, og tað tykist ikki serliga sannlíkt, at tað skal eydnast at skjóta fleiri mál á Sevmýri, har heimaliðið er vorðið kent fyri krút stinna verju.

Í gjár vóru Jónreid Dalheim og Sámal Joensen framvegis skaddir. Tað varð ikki roknað serliga sannlíkt, at teir fara at verða tøkir mánadagin. Í gjár vóru bæði Súni Olsen og Popczynski sjúkir, men í Gøtu vónaðu teir, at hesir báðir lyklaspælararnir verða við til Suðuroyar.

Á Sevmýri er lagið gott. Tað er smeitur, at Alexander Jovevic ikki er tøkur. Tað høvdu teir roknað við og vónað. Jovevic spældi fyrstu løtuna í Vági, men hann noyddist at gevast, tá ið ein hálvur tími var farin. Men Milan Milanovic sigur seg hava álit á spælarunum, sum hann fer at senda á vøllin mánadagin.

Talan er um tað, sum plagar at verða nevnt seks stigs dyst. Um GÍ tapir, so verður frástøðan fram til tey næstu ógvuliga stór. Um tað harafturímóti verður TB, sum fer at fáa øll stigini, so verður TB støðan rættuliga góð, meðan gøtumenn fara at vera uppaftur nógv verri staddir, enn teir nú eru tað.

---

# Fleiri vilja eiga Ólavsøkuna

**Róðrarfelagið Knørrur og Argja Róðrarfelag vilja hava FSF aðalfundin at samtykkja, at hesi feløgini skulu fyrireika kappróðurin á tjóðarhátíðini saman við Havnar Róðrarfelag**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Á aðalfundinum hjá Róðrarsambandi Føroya, RSF, sum verður 2. hvítusunnudag, vilja Róðrarfelagið Knørrur í Havnini og Argja Róðrarfelag hava limafeløgini at samtykkja, at hesi bæði feløgini skulu fyrireika ólavsøkukappróðurin saman við Havnar Róðrarfelag.

Feløgini skjóta upp, at grein eitt í reglunum hjá RSF fyri føroyameistaraheitið í kappróðrið verður broytt.

Higartil hevur staðið í grein eitt soleiðis: "Tað eru 7 stevnur, sum geva stig til føroyameistaraheitið í kappróðri. Tær eru Norðoyastevna, Fjarðastevna, Eystanstevna, Jóansøka, Sundalagsstevna, Vestantevna og Ólavsøka".

Knørrur og Argja Róðrarfelag vilja hava RSF aðalfundin at leggja hetta afturat orðingini í grein eitt: " Sum fyrireikarar fyri hesum stevnum standa Klaksvíkar Róðrarfelag fyri Norðoyastevnu, Vestmanna Ítróttarfelag, Ungmannafelagið Strálan og Skála Róðrarfelag fyri Fjarðastevnu, Kappróðrarfelagið NSÍ og Ítróttarfelag Fuglafjarðar fyri Eystanstevnu, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag og Vágs Kappróðrarfelag fyri Jóansøku, Hósvíkar Róðrarfelag, Hvalvíkar-Streymnesar Róðrarfelag og Kollafjarðar Ítróttarfelag fyri Sundalegsstevnu, Sørvágs Róðrarfelag, Miðvágs Kappróðrarfelag og Sandavágs Ítróttarfelag fyri Vestanstevnu og Havnar Róðrarfelag, Argja Róðrarfelag og Róðrarfelagið Knørrur fyri Ólavsøku".

Í viðmerkingunum til uppskotið vísa tey bæði feløgini á, at tey eru ikk heilt nýggj í kappróðri longur. Felagið á Argjum varð stovnað í 1982, og Knørrafelagið varð stovnað í 1985. Víst verður eisini á, at úrslitini hjá feløgunum tala fyri, at tey í allar mátar royna at taka uppgávu sína í álvara, og bæði hava roynt at givið sítt íkast til føroyskan kappróður.

Feløgini halda, at framtíðin er treytað av ungdómsarbeiðnum, og at tey tí leingi hava arbeitt fyri at fáa lut í teimum skyldum, rættindum og fíggjarligum ágóðum, sum fyriskipanin av ólavsøkuróðrinum gevur. Feløgini halda, at Havnar Róðrarfelag sum fyrireikari av ólavsøkuróðrinum hevur stóran fyrimun sammett við hini feløgini. Tey siga seg hava heitt á Havnar Róðrarfelag, RSF og Tórshavnar býráð fyri at sleppa upp í part og harvið eisini at fáa lut í inntøkunum, sum Ólavsøkan ber við sær, men at einki er komið burturúr samráðingunum. Tí verður uppskotið um broyting í grein eitt í ásetingum fyri FM róður lagt fyri aðalfundin.

### Skeiv adressa

Á heimasíðuni hjá Havnar Róðrarfelag, drekin.fo, verður ikki tikið undir við uppskotinum. Heimasíðan mælir feløgunum til at finna sær aðrar inntøkukeldur og harvið at Havnar Róðrarfelag framvegis, sum teir hava havt tað í mong ár, skal eiga rættin at fyrireika og harvið eiga inntøkurnar og útreiðslurnar í sambandi við kappróðurin á Ólavsøku. Víst verður eisini á, at umframt tey bæði nevndu feløgini eru fleiri onnur róðrarfeløg í Tórshavnar Kommunu. Her verður hugsað um felagið í Hoyvík og felagið í Kollafirði.

Havnar Róðrarfelag dugir ikki at síggja, at hetta er eitt mál fyri aðalfundin hjá RSF, men at hetta er eitt mál, sum eigur at vera viðgjørt millum kommununa og feløgini í kommununi.

Formaðurin í Róðrarsambandinum, Hannis Joensen, vil ikki vera partur av viðgerðini av hesum málinum. Tað vil hann ikki, tí hann í mong ár hevur verið og er limur í Havnar Róðrarfelag. Málið er tískil latið næstformanninum, Jan Herman Hansen, at taka sær av.

Jan Herman Hansen sigur, at somu feløg løgdu sama mál fyri aðalfundin í 2001. Tá varð tað tikið upp undir ymiskum, og tá varð tað avvíst av feløgunum, sum ikki mettu, at hetta var spurningur fyri RSF at taka sær av, men heldur fyri tey í Havnini.

- Nú er talan um uppskot til broyting í ásetingunum, og reglurnar siga, at í sovornum føri skal málið viðgerast. Men tað merkis ikki tað sama, sum at tað skal setast undir atkvøðugreiðslu, sigur Jan Herman Hansen, næstformaður í RSF.